Kyndil-VÍF 21-20 (13-9):

Kyndlakvinnurnar endurtóku bragdið

Fyri trimum vikum tóku kvinnurnar hjá Kyndli øll á bóli við at vinna á VÍF, og sunnudagin endurtóku tær bragdið – aftur hesa ferð við bara einum máli á muni

KVINNUHONDBÓLTUR
Hilmar Jan Hansen

Kvinnurnar hjá VÍF, sum hava dominerað kvinnuhondbóltinum fullkomuliga síðstu tveir vetrarnar, líkjast framvegis ikki sær sjálvum.

Liðið hevur verið óstøðugt, og sum tað hevur gingið higartil, peikar einki á eina endurtøku av greipunum hesi bæði kappingarárini.

Heldur ikki tað, at ein møguleiki var fyri, at VB kundi koppað á Skála móti StÍF, var nóg mikið til at styrkja VÍF-liðið so frægt, at tað kláraði at vinna á Kyndli.

Kvinnuliðið hjá vestmenningum hevði annars nakað at hevna, tí tað vóru ikki meira enn tríggjar vikur síðani, at Kyndil í Vestmanna hevði skapt sína fyrstu sensatión í ár og hevði vunnið á VÍF við einum máli.

Tvørturímóti sá tað nógv meira út til, at Kyndil vildi gera sítt besta fyri at endurtaka bragdið.

Tað eydnaðist enn einaferð hjá Lotte Sørensen og teimum í Kyndli at steðga føroyameistarunum úr VÍF
Mynd: Álvur Haraldsen

Nógv vongmál

VÍF hevði betur tak á tí heila fyrstu tjúgu minuttirnar, men so kom Kyndil betur við, og serliga var tað vongspælið, ið gjørdi munin teir síðstu minuttirnar av fyrra hálvleiki.

Sonja Smiljic var undan dystinum sera ivasom, tí hon fyrr í vikuni beklaði, men kortini valdi hon at bjóða seg til og varð skift inn á vinstra vong.

Saman við Ann-Mari Vang á høgra vongi syrgdi Sonja fyri, at Kyndil ikki bara kom inn í dystin, men eisini legði seg væl á odda undan steðginum.

Síðstu átta minuttirnar undan steðginum skoraðu tær báðar sjey mál, meðan VÍF bara ta einu ferðina fekk bóltin inn um vælspælandi Fríðu Petersen í Kyndlamálinum.

Hetta vendi ordiliga dystinum, og nú var tað brádliga Kyndil, ið var langt frammanfyri, meðan VÍF skuldi royna at sleppa upp í part aftur eftir steðgin.

Fekk Kyndil aftur

Liðið hjá VÍF arbeiddi eisini væl fyri sakini í seinna hálvleiki, men ikki uttan svørðslag, tí Kyndil strídddist væl og vildi ongantíð sleppa VÍF.

Serliga var tað í verjuni, at tær hjá Kyndli royndust væl. Hvørki Sóley Mikkelsen ella Jacklyn Durhuus, ið báðar eru stórar skothóttanir, sluppu so væl framat, sum tær annars plaga at gera.

Kortini eydnaðist VÍF stig fyri stig at koma innaftur í dystin, og tá tað leið móti endanum, var líkt til, at tær úr Vestmanna skuldu fara avstað við øllum.

Fýra minuttir fyri tíð var VÍF fyri fyrstu ferð á odda í seinna hálvleiki, tá tað bleiv 20-19.

Men Kyndil hevði ikki brúkt sínar síðstu trumfir. Annika Thomsen javnaði til 20-20, tá ein minuttur var eftir, og so var tað, at VÍF fór í skjótálop og kundi havt lagt seg framum eina ferð enn.

Jacklyn Durhuus fór frameftir, men misti bóltin, og so kundi Lotte Sørensen spæla Ilianu Manolescu fría til sigursmálið í allarsíðstu løtuni.

Sum vera man var stór frøi á Kyndlaspælarunum, nú tað enn eina ferð hevði eydnast at koppa VÍF, sum hinvegin kundi iðra seg um, at sjálvt ikki javnleikur fekst burtur úr dystinum, sum at enda kundi verið koppaður báðar vegir.

Kyndil-VÍF 21-20 (13-9)

Málskjúttar:
Kyndil: Sonja Smiljic 7 (4), Ann-Mari Vang 5, Iliana Manolescu 4, Marjun Tróndarson 2, Annika Ljósstein 1, Lotte Sørensen 1 (1), Annika Thomsen 1
VÍF: Sóley Mikkelsen 8 (2), Nicoleta Radu 4, Nikolina Eyðbjørnsdóttir 3, Jacklyn Durhuus 3, Alis Høghamar 2
Brotskøst: Kyndil 7, VÍF 2
Útvísingar: VÍF 4
Dómarar: Kristian Johansen og Sámal Joensen

StÍF-VB 27-25 (9-12):

StÍF bremsaði VB

Eftir sjey sigrar á rað steðgaði sigursrøðin hjá VB á Skála sunnudagin, tá liðið ikki fekk vart seg móti taktiskum snildum frá StÍF, ið fult uppiborið fekk bæði stigini

KVINNUHONDBÓLTUR
Hilmar Jan Hansen

Fyrr ella seinni mátti tað henda, og tað mundu tey í VB eisini vera greið yvir. Eftir sjey sigrar á rað og enn einki tap í landskappingini í vetur, øktist vandin bara fyri, at okkurt av hinum liðunum hevði lúrt VB av.

So var eisini, tá VB var á Skála og vitjaði StÍF, tí strandakvinnur vóru væl fyrireikaðar og høvdu taktiskar snildir at taka í brúk frá fyrstu løtu.

Vápnið hjá StÍF var sera einfalt, men ikki minni effektivt: Daiva Toumaite og Reda Kurkauskiene blivu mansvardar allan dystin, og tað skerdi liðið hjá VB so nógv, at tað ikki vann upp land, men tapti fyri fyrstu ferð í vetur.

Tað vísti seg beinanvegin, at hóast VB kanska hevði fyrireikað seg uppá, at onnur skuldi verða tikin burturúr – tað er jú hent so ofta í undanfarnu dystunum – so átti VB einki nóg gott móttrekk, tá báðar tær litavisku blivu mansvardar.

Taktikkurin hjá StÍF, sum í útgangsstøðinum var grundaður á at pilka spælið hjá VB sundur, eydnaðist til fulnar, og hesin taktikkurin helt sær eisini allan dystin – og kvinnurnar hjá StÍF fylgdu honum til punkt og prikkar!

Moralsk styrki

VB vísti seg at hava munin tað mesta av fyrra hálvleiki, men slapp kortini ongantíð ordiliga úr haftinum hjá StÍF.

Tað, sum VB fyrst og fremst fekk síni mál uppá, vóru mistøk hjá StÍF upp eftir vøllinum, ið VB ógvuliga kyniskt revsaði við skjótum mótálopum, ið ofta góvu mál.

Men hóast tað skuldi taka sína tíð, áðrenn stríðið hjá StÍF-kvinnunum vísti sítt virði á máltalvuni, má tað sigast at vera moralsk dygd, at trúgvin upp á tað kann bera allan vegin, sjálvt um hitt liðið blívur við at vera frammanfyri.

Spakuliga vann StÍF seg fram á VB, og ikki fyrr enn síðstu tíggju minuttirnar var dysturin av álvara opin, tí tá hevði StÍF bæði javnað og lagt seg framum.

Hesa løtuna royndi VB seg við sama vápni, tí bæði Asta Petrauskiene og Alina Olaru hjá StÍF blivu mansvardar, uttan at tað styrkti nakað um VB – heldur øvugt.

Í endafasuni hevði StÍF fingið so gott tak á, at VB einki mál fekk síðstu fýra minuttirnar, meðan StÍF skoraði tríggjar ferðir og soleiðis bardi seg frá 24-25 upp á endaliga úrslitið 27-25.

Kanska ein ávaring

Ikki kann annað sigast, enn at hetta var ein uppiborin sigur, hóast tað ikki alla tíðina var so stuttligur og undirhaldandi hondbóltur.

Líka síðani kappingin byrjaði og VB bara bleiv við at vinna og vinna, er tað blivið eitt alsamt vaksandi ynski hjá hinum liðunum, at tey kláraðu at basa júst kvinnunum úr Vági, og nú gjørdist tað so StÍF, ið var fyrsta liðið at klára tað.

VB mundi eisini á Skála sunnudagin fáa eina stóra ávaring um, at meira má fáast burturúr, tá dupult mansverja verður brúkt.

Lítið man vera at ivast í, at hini liðini eisini fara at taka táttin upp, og tá má tað so vera spurningurin, um VB dugir at svara aftur, ella um StÍF í veruleikanum hevur avdúka størsta veikleikan hjá oddaliðnum.

Fyrsta møguleikan at svara tí spurninginum fær Kyndil, sum nú skal til Vágs. Sunnudagin vann Kyndil á VÍF uttan at brúka mansverju, og so fæst at síggja, um tær grønu eisini fara at royna tað sama móti VB, ella um roynt verður at vinna á oddaliðnum við »StÍF-knepinum«_

StÍF-VB 27-25 (9-12)

Málskjúttar:
StÍF: Asta Petrauskiene 8 (2), Alina Olaru 5, Poula D. Olsen 5, Anna Maria Berthelsen 3, Anna B. Danielsen 3, Súnfríð Jacobsen 2 (1), Paula B. Høgnesen 1
VB: Daiva Toumaite 12 (4), Reda Kurkauskiene 5, Laila Jespersen 4, Gurið Mortensen 3
Brotskøst: StÍF 5
Dómarar: Trygvi Mortensen og Kári Hansen

Brøndby er nú næstfremst

Felagið hjá Jón Róa Jacobsen er fremst av teimum, sum í vár fara at hava stóra setningin at kappast við FCK

SUPERLIGAN
Jóannes Hansen

Todi Jónsson hevur verið einasti føroyingurin í superliguni síðani summarsteðgin. Nú er superligan farin í vetrarfrí. Í mars verður sjøtul settur á aftur kappingina. Tá skulu hini liðini royna at fáa FCK aftur. Eftir átjan tey fyrstu umførini er FCK nígggju stig undan næstu kappingarneytunum. Tað eru fimtan umfør eftir at spæla.

Tað eru góðir møguleikar fyri, at ein føroyingur verður á liðnum, sum liggur best fyri í kappingini at røkka FCK. Jón Rói Jacobsen er knýttur at Brøndby, sum er næstfremst. Munurin er nígggju stig, men eingin veit betri enn teir í Brøndby, at tað ikki er púrasta givið, at nígggju stig er nóg mikið at kenna seg tryggan. Í fjør vóru teir í vetrarsteðginum tíggju stig frammanfyri FCK. Todi og teir tóku so mikið nógv inn á Brøndby, at talan var um rættuliga finalu, tá ið FCK og Brøndby spældu í Parkini í næstsíðsta umfarinum. Ta ferðina endaði tað 1–1, og so varð Brøndby meistari.

Leygardagin var Brøndby í Køge. Tað sá leingi ógvuliga svart út. Stutt undan steðginum var álopsspælarin Peter Madsen, sum ofta tykist óargaligur, rikin av vøllinum, tí dómarin helt hann hava brúkt ov ljótan munn. Í 2. hálvleiki misti Køge ein mann og síðstu løtuna skoraði Brøndby tey bæði málini, sum høvdu við sær, at teir eru næstfremstir í superliguni.

Farum fór fram um AaB, og nú eru uppflytararnir á bronsuplássinum. Teir høvdu vitjan av OB, og hóast teir høvdu nógv spæl og málmøguleikar, so sá tað leingi út til, at teir skuldu tapa. OB legði seg á odda við brotssparki í 39. minutti. Í 89. minutti javnaði Farum, og í síðsta minuttinum skoraðu teir sigursmálið, sum venjarin hjá teimum, Christian Andersen, avgjørdur metti, at teir høvdu uppiborið.

AaB kiksaði aftur

AaB hevur leingi verið næstfremst. Teir hava verið óstøðugir, men tað hevur serliga verið á heimavølli. Hesa ferð vóru teir í Århus. AGF hevur nógvu tær síðstu vikurnar verið sera óstøðugt. Men tað eydnaðist hesa ferð at fáa trý stig og harvið kveikja vónina av nýggjum um, at tað ikki skal enda heilt galið. Úrslitið var 1–0, og tað var innskifti Morten Rasmussen, sum skoraði málið, tá ið tað restaðu trettan minuttir.

Esbjerg hevur verið ímillum tey fremstu. Hesa ferð høvdu teir vitjan av AB, sum eftir sera lítið sannførandi byrjan ikki hevði tapt í sjey dystum á rað. Heldur ikki hesa ferð fóru teir grønu av vøllinum stigaleysir. Úrslitið í Esbjerg var 1–1. Heimaliðið kom á odda í 22. minutti, men tíggju minuttir seinni javnaði AB. Hóast gongdin hevur verið hugalig í næstan tveir mánaðir, so er tað ikki víst, at AB venjarin fer at halda fram í felagnum. Norska Lyn, sum í farna kappingarárinum endaði á triðja plássinum, vil hava danska venjaran.

FCM hevði vitjan av Viborg, og heimaliðið vann 3–1.

Áskoðaratalið sunnudagin var ikki so stórt, sum tað var fyrr í heyst, tá ið veðrið var væl betri, enn tað nú er í Danmark. Men í Parkini møttu næstan átjan túsund upp. Tað vóru fleiri, enn tað hugdu at øllum hinum fimm dystunum tilsaman.

Stjørnan-Tjaldur 33-19 (15-10):

Stjørnan í stórum stíli

Uttan at himprast sópaði Stjørnan gestirnar úr Runavík av vøllinum, tá Tjaldur var og vitjaði í Klaksvík. Frá fyrstu løtu sat Stjørnan á dystinum og vann ein sannførandi sigur

KVINNUHONDBÓLTUR
Hilmar Jan Hansen

Stjørnan, sum í grundini als ikki ætlaði sær at melda lið til bestu kvinnudeildina í vetur, vísti sunnudagin sera gott spæl, tá botnliðið Tjaldur var á vitjan.

Sjálvandi var bakgrundin kanska í so bílig, men tað skal ikki taka nakað frá spælarunum hjá Stjørnuni, ið vístu varierað og hugflogsríkt spæl frá byrjan til enda.

Tær flestu á liðnum taldust enntá millum málskjúttarnar, so breiddini sær heldur ikki út til at bila nakað, nú Stjørnan er komin í gongd.

Dysturin móti Tjaldri var fullkomuliga uttan spenning, tí talan var um einvegis ferðslu allan vegin.

Gamaní vóru tær úr Tjaldri á odda 1-0 og 2-1, men so var teirra leiklutur eisini liðugur í hesum dystinum, ið gjørdist rein Stjørnu-uppvísing.

Longu í hálvleikinum vóru fimm mál á muni, og hóast tað skjótt kann vera at dovna undir slíkum umstøðum, har mótstøðan ikki er tann størsta, gjørdi Stjørnan sítt til at fáa sum mest burturúr.

Hetta er júst rætti hugburðurin, um liðið ætlar sær longur fram. Og tað er ikki sørt, at tað tykist vera ætlanin hjá Stjørnuni, nú liðið hevur fingið tak á rætta endanum.

Einki uppspæl

Hjá Tjaldrinum sær støðan hinvegin bæði vón- og troystarleys út í botninum, har liðið framvegis bara hevur tvey stig — og tey eru enntá fingin á útivølli móti Kyndli!

Lenka Ribaric og Melica Ergic eru einastu dygdarspælararnir hjá Tjaldri, og uttan tær báðar var liðið ikki nógv vert.

Hetta vísti seg eisini sunnudagin, tí Tjaldur hevði stórar trupulleikar við uppspælinum, var ikki onnur av teimum útlendsku millumstøð.

Men sjálvt ikki Ribaric og Ergic kundu gera nakað við liðið hjá Stjørnuni, sum við ferð og skjótum spæli fullkomuliga niðurspælди Tjaldur.

Tekniskt góðu og skjótu spælararnir hjá Stjørnuni vóru ov góðir til, at nakað kundi spyrjast burturúr hjá Tjaldri, og tí kundi tað ikki enda við øðrum enn stórsigri til heimaliðið.

Stjørnan hevur nú vunnið seg upp á fjórðaplássið, fimm stig aftan fyri oddaliðið VB, men bara tvey stig frá næstfremsta plássinum og VÍF og StÍF.

Næstu ferð er talan um útidyst í Vestmanna, og tá fæst kanska sjón fyri søgn, hvussu gott liðið hjá Stjørnuni í veruleikanum er. Í øllum førum fæst tá onnur mótstøða enn nú sunnudagin!

Stjørnan-Tjaldur 33-19 (15-10)

Málskjúttar:
Stjørnan: Danijela Ercevic 10 (4), Natasha Stamenkovic 5, Davina Sundskarð 5, Bára S. Klakkstein 3, Rannvá Andreasen 2, Irdi Mikkelsen 2, Súsanna Hansen 1, Gunvør Isaksen 1, Maria við Neyst 1
Tjaldur: Melica Ergic 6 (1), Lenka Ribaric 5 (3), Kristine Ellingsgaard 3, Oddvá Fossdalsá 3, Heidi Heinesen 2
Brotskøst: Stjørnan 4, Tjaldur 5
Útvísingar: Stjørnan 4, Tjaldur 4
Dómarar: Hallur Danielsen og Jákup Símun Simonsen

1. Deild kvinnur

		dystir	v	j	t	vunnin mál	tapt mál	málmunur	stig
1	VB	8	7	0	1	197	163	34	14
2	VÍF	9	5	0	4	202	174	28	10
3	StÍF	9	5	0	4	212	218	-6	10
4	Stjørnan	8	4	1	3	179	172	7	9
5	Kyndil	8	4	0	4	197	187	10	8
6	Neistin	9	3	1	5	167	185	-18	7
7	Tjaldur	9	1	0	8	176	231	-55	2

1. Deild menn

		dystir	v	j	t	vunnin mál	tapt mál	málmunur	stig
1	StÍF	10	8	0	2	294	253	41	16
2	VÍF	10	6	1	3	313	257	56	13
3	Neistin	9	6	0	3	258	243	15	12
4	Kyndil	9	4	2	3	246	238	8	10
5	KÍF	9	3	1	5	233	233	0	7
6	H71	9	2	0	7	210	262	-52	4
7	Tjaldur	10	2	0	8	242	310	-68	4